

**Eirikur Lindenskov**
*blaðstjóri*

# Tórshavn tú Føroyalands miðstøða var

## *– Tað er einaferð um árið, at ólavsøka er, tá liva allir føroyingar í aðrari verð*

Soleiðis yrkir Kári Jacobsen í sanginum »Á tann deiliga Havn«, sum hevur verið at hoyrt hvørja einastu ólavsøku, síðani sangurin varð til seinast í áttatiárunum. Og rætt hevur hann. Ólavsøkan er nakað serligt, ikki bara fyri okkum havnarfólk, men eisini fyri allar gestir, sum leita sær av bygd og úr útlondum til Havnar at hátíðarhada tjóðarhátíð alra føroyinga.

Hóast tað seinnu árini hevur verið roynt at tjóvstartað ólavsøkuna eitt sindur fyrr við ymsum tiltøkum, so byrjar ólavsøkan ikki rættiliga, fyrr enn hon verður sett á Vaglinum ólavsøkuaftan, og tú ert búgvin í búna at fara til kappróður – tí kappróðurin er eitt sereyðkenni fyri ólavsøkuna.

Fyri okkum, sum eru barnfødd havnarfólk, er ólavsøkan nakað heilt serligt. Hóast ólavsøkan er vorðin eitt við Havnina, so er ólavsøkan kortini stevnan yvir øllum stevnum, og stevnan hjá øllum føroyingum. Ólavsøkan er eisini søga - upprunin er jú at minnast Ólav kong, sum fall á Stiklastøðum fyri skjótt túsund árum síðani. Tí nertir ólavsøkan við okkara uppruna og okkara samleika - og okkara kristna kjølfesti.

Á ólavsøku verður tingið sett. Ein tann størsta hátíðarløtan á ólavsøkuni er uttan iva, tá okkara politiska skipan fer í skrúðgongu úr tinginum í Havnar Kirkju til gudstænastu ólavsøkumorgun - og niðan aftur í løgtingið, har klárt er at byrja nýggja tingárið. Ein sera vakur siður, sum styrkir samanhaldið millum føroyingar.

Veðrið hevur sjálvandi alt at siga á ólavsøku. Er gott veður, ja so leita øll sær oman í býin, men regnar - og regnar illa, so kann tað gerast rættiliga fólkatómt - og tá er gott at sita fjálgt við búgvið borð hjá frægum fólki - sum eisini er ein partur av ólavsøkuni.

Vit vænta sjálvandi ikki regn á ólavsøku í ár - í øllum førum ikki so nógv, og tí er hýrurin góður, og vit kunnu syngja víðari við Kára í hansar »ólavsøkukantatu«:

*– Sjálvt Effersøa á Vaglinum, hann erí*
*góðum lag*
*Frøast kunnu øll um, at Havnin hon er vár.*
*Ólavsøkusiðurin skal liva ár um ár.*
*Onga aðrastaðni í hesi víðu verð*
*er hýrurin so góður, sum tá ólavsøka er.*

Vit í Miðlahúsinum ynskja øllum eina góða ólavsøku við takkarorðunum hjá Pól F. Joensen til Havnina og ólavsøkuna:

*Tøkk fái Havnin og fólkið, har býr,*
*fyri góð minnir og gleim,*
*sum hon á Ólavs halgaðu tíð*
*gav til hvørt Føroyalands heim.*
*Tí ólavsøkan skal øld eftir øld*
*reka burtur klandur og sorg.*
*Veri, so leingi sum føroyingur er,*
*Tórshavn vár miðstøð og borg.*

Góða ólavsøku!

## Innihald:


**2** Tórshavn, tú Føroyalands miðstøða var
**4** Heðin Mortensen: Vælkomin á ólavsøku
**6** Ingi Sørensen: Bygdamen eru vælkomnir til Havnar
**10** Løgmaður: Lættari at halda ólavsøkuróðu í ár
**12** Kabarettin prikar vanliga føroyingin
**15** Tað er gróður í føroyskari list
**16** Soleiðis leggur tú turriklæðið og dregur stiman
**18** Ólavsøkukonsertin ein heildaruppliving
**20** Føroysk klæði við einum twisti
**24** Uni Næs: Góð orð við á vegnum
**26** Voxpop: Mín ólavsøka
**28** Ólavsøkukantatan og kórið 80 ár
**34** Kappróður
**38** Rasmus Klipp: Fyrr var ólavsøkan nógv villari
**42** Ítróttur á ólavsøku
**44** Kýsin og húgvan hvørva
**48** Ólavsøkufríggið
**50** Skrúðgongan
**53** Vónandi regn á ólavsøku
**54** 60 fólk rudda
**60** Kronikk: Broytt og varðveitt



**Ólavsøkublaðið 2010**

**Útgevari:**
Sosialurin

**Redaktørur:**
Eydna Skaale

**Blaðfólk:**
Dagfinn Olsen
Eirikur Lindenskov
Eyðun Klakstein
Eydna Skaale
Leif Hansen
Theodor Olsen
Tróndur Arge
Uni Arge
Uni Holm Johannesen

**Myndir:**
Jens Kristian Vang
Álvur Haraldsen

**Lýsingar:**
Elin Vatnhamar Olsen
Durita Joensen

**Umbróting:**
Sosialurin

**Forsíðumyndin:**
Jens Kristian Vang

**Modellir:**
Fríða við Streym
Durita J. Joensen
Óluva á Lofti
Súsanna Olafsdóttir

Sosialurin